


*Bilurin sum familjan Heinesen í Mykineshólmi vann í 1966, ein Ford Taunus 17m. Sum tað sæst á skeltinum, er myndin tikin seinasta søludag av lutaseðlum fyri Kirkjubøar kirkju. Lutaseðilin kostaði 10 krónur. Maðurin við bilin er Hjalgrim Hentze, táverandi stjórin hjá Ford umboðnum í Føroyum, P/F Wenzel Petersen. Mannin uttast til høgru á myndini halda vit vera Kim Lützen.*

*Mynd: P/F Wenzel*

# Familja í Mykineshólmi vann bilin

VINNUNGUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í 1960-unum var tað ikki vanligt at burturluta bilar, heldur ikki stórar og flottar bilar.

Tá kirkjan í Kirkjubø skuldi umvælast miðskeiðis í 60-unum var ein svartur Ford Taunus 17 m burturlutaður, og tað sjaldsama hendi, at tað var ein familja í Mykinehólmi, sum vann bilin í 1966.

Tað vóru hjúnini Erika og Leon Heinesen, sum tá høvdu búðu í Mykineshólmi í tvey ár, sum vunnu bilin. Tey keyptu ein lutaseðil fyri tíggju krónur og vunnu bilin. Leon var vita-assistentur og bleiv um hesa tíðina settur sum vitameistari í Mykinehólmi. Bilurin kom sjálvsagt ongantíð út í hólman, men stóð í garaguni í húsum teirra í Sørvági. Tey koyrdu við bilinum, tá tey vóru í Sørvági.

Í 1970 flutti familjan til vitan í Akrabyrgi, har Leon varð settur sum vitameistari. Har fingu tey bilin til húsini og brúktu hann dagliga.





*Húsini í Mykinsehólmi, tá Leon við familju búði har. Húsini hjá Leon í Fútalág eru sett saman av báðum assisitent-húsunum. Teimum báðum húsunum sum eru heilt eins og standa næst sjónum*

**Í Bilradio á Rás2**
*hósdagin kl. 17.15 er samrøða við Leon Heinesen*

*Leon Heinesen uttan fyri hús síni í Fútalág. Húsini eru tey somu, sum hann búði í úti í Mykineshólmi. Tey vóru tikin niður og flutt til Havnar í 1970*

*Mynd: Jens Kristian Wang*